# HEILSANIR





Allarbesti Kristmund Rói, hjartaliga tillukku á 20 ára degnum, Vit elska teg.
**Bestu heilsanir mamma og Rasmus**



**Góði fitti Aron**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Harrin signi framtíð tína.
**Heilsan abbi og gubbi**



**Góði elskaði Atli!**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag, við ynskjum um alt tað besta framyvir.
**Bestu heilsanir frá mostir**
P.S. Her ert tú cool!!

Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, sum gleddu meg á konfirmatióndegnum 30. sept. Gleðilig jól og gott nýggjár.
**Heilsan Bjarni Kjærbæk, Øravík**



**Góði elskaði Aron**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 1. des.
**Heilsan mamma og babba**



**Fitti Aron**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan diddi**



**Góði fitti Atli**
Tillukku við 1 ára degnum.
Muss og klemm frá
**ommu og abba í Rituvík**



**Góði lítlibeiggi**
Lukku og gleði á tínum 1 ára degi 1. des. Eg elski teg.
**Stóribeiggi Dánjal**



**Góði elskaði Atli!**
Lukku og gleði á tínum 1 ára degi. Vit ynskja tær alt tað besta í framtíðini.
**Bestu heilsanir omma og abbi á Strondum**



Hjartans tøkk til øll tykkum, ið gleddu okkum á hjúnabandsdegnum tann 21. juli 2001 bæði í Havn og í Sandavági. Tit gjørdu dagin ógloymandi fyri okkum.
**Sára og Arngrím**



**Góði elskaði Atli**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Alt tað besta ynski eg tær.
**Heilsan frá mamba**



**Góða Súsanna omma!**
Hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum og alt tað besta í framtíðini. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Vónandi verður tað ein góður føðingardagur í morgin.
**Heilsan Jan og Tóki**



# TILTØK

## FØÐINGAR

21. november fingu Maál Göthe og Jón Olsen, Herlev, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4350 gr.

22. november fingu Rúna Dalsgarð og Jakob Jónsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4200 gr.

23. november fingu Tove og Dánjal Tausen, Hoyvík, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 2560 gr.

25. november fingu Súsanna og Joel undir Leitinum, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3750 gr.

27. november fingu Randi Jacobsen og Uni Magnussen, Kvívík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

28. november fingu Elsa Nielsen og Frits Jacobsen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3550 gr.

## ANDLÁT

**20. november**
Poulina Mohr Jacobsen, úr Vági, 80 ár.

**23. november**
Esther Dam Olsen, fødd Djurhuus, búsitandi í Lyngby, ættað úr Porkeri, 89 ár.
Kristianna Danielsen, av Strondum, 90 ár.

**24. november**
Sólbjørg Rasmussen, fødd Viderø, ættað av Sandi, búsitandi í Tåstrup, 79 ár.

**28. november**
Torbjørn Hentze, Argir, 80 ár.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 1. des.: Andreas Petersen, tlf. 441086
Sunnudagin 2. des.: Magnus á Stongum, tlf. 423006

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## PRÓGV

Gunnhild Helmsdal, Hoyvík, hevur frá University of Glasgow, lokið prógv sum Master of Research í biomedisinskari gransking.

## 25 ÁRA STARVSDAGUR

Í dag, 1. desember hevur Margretha Jørgensen starvast í 25 ár á Føroya Fiskasølu.

### Gudstænastur leygardagin 1. des.

*Vesturkirkjan* kl. 19.30 skipar felagsskapurin »KRIS í Føroyum« fyri Rósugudstænastu. Hans Eiler Hammer prædikar, altarg.

### 1. sunnudag í advent

*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk, talvan gongur fyri føroysku Sjómanskirkjuna
*Nólsoy:* kl. 12, (talvan gongur fyri hina Føroysku Sjómanskirkjuna), kl. 17 adventsgudstænasta, skúlabørnini luttaka og kórið syngur, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, familjugudstænasta, Heri Joensen. Musikspælistovu- og sangnæmingarnir hjá Angelu og Sigrid syngja
*Argir:* kl. 11, familjugudstænasta, Bergur D. Joensen. Magni Christiansen syngur. altarg. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Hvalvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 15, familjugudstænasta við altargongd, Marjun Bæk. Aftaná verður adventshugni í missiónshúsinum. Í øllum kirkjum í Norðstreymoyar prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Sørvágur:* kl. 12, David Johannesen. Í øllum kirkjum í Vága prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Norðskáli:* kl. 17, altarg., Peter O.K. Olofson, kirkjukaffi aftaná
*Eiði:* kl. 12, hátíðarmessa (farið verður aftur í kirkjuna), Hans J. Joensen, biskupur og Emil Olsen, kl. 18 ljósgudstænasta (samvera við drekkamunni verður fyri øll í EB-húsinum aftaná), Emil Olsen. Talvan gongur við Gjógv, í Funningi og við Norðskála fyri hina Føroysku Sjómanskirkjuna
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, kl. 18 ljósmessa, Jógvan Fríðriksson. (Í Sjóvar prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna)
*Glyvrar:* kl. 11, Fríðrikskirkjan: kl. 15 barna- og familjugudstænasta, (aftaná verður adventshugni í kirkjukjallaranum)
*Rituvík:* kl. 19, Teir sjey lestrarnir (aftaná verður adventshugni í missiónshúsinum). Meinhard Bjartalíð. Í Glyvra og Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Árnafjørður:* kl. 12,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen. Talvan gongur í Norðoya vestara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Hvannasund:* kl. 12, altarg. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Viðareiði:* kl. 15, familjugudstænasta, Elsa Funding
*Sandur:* kl. 12, Jákup Reinert Hansen. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Tvøroyri:* kl. 11, barna- og familjugudstænsta. Talvan gongur fyri Hina føroysku Sjómanskirkjuna
*Vágur:* kl. 11,
*Sumba:* kl. 17, Marianne Telling

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 14.00 í Hoyvíkar skúla Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18.00 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti hjá Jóna og Miu Johannesen, á Frælsinum 24. Øll eru vælkomin.

### »Tíð til Gud«

verður úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Evni: Internet-porno, seksuell avgudadyrkan? Verið hjartaliga vælkomin.

### Hebron, Argir

Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Mánadagin kl. 18.30 Hugnaløta teirra ungu.

### Katólska kirkjan

Hósdag kl. 20.00 bønarkvøld (á enskum) í Mariukirkjuni.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.

### Frelsunarherurin, Tórshavn

Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18.00 Møti, Sámal Jákup og Elisabeth Joensen leiða og tala. Øll eru vælkomin.
Tríggjar mikudagar í des. 5., 12. og 19. kl. 17.30-19.00 fara vit at hava jólaverkstað fyri børn í aldrinum 2-10 ár. Børn 2-5 ár skulu hava foreldur við. Vit gera jólaprýði, eta saman o.a. Kostnaður 20 kr. fyri hvønn. Verið hjartaliga vælkomin.

### Sjómanskvinnuringurin á Argjum

Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

### KFUM og KFUK í Havn

Sunnudagin 2. desember kl. 16.00 í KFUK: Adventsveitsla. Inngangur við Hera Joensen, presti. Kristiliga sangkórið luttekur.
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Niels Jacob Nielsen, trúboðara. Evni: 1. Kongabók.
Týsdagin kl. 17.00 í KFU: Várgleði fyri børnini og foreldrini. Jólahugni, Jóna Thomsen, barnaráðgevi luttekur. Tekning neyðug.

### Aglow, Tórshavn

Jólafundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur og menn eru vælkomin.

### Rhema á Hálsi

Mikukvøldið kl. 20.00 Húsmøti hjá Anju og Vagn í Geil, Reynstún 28, Argir.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids.
Sunnudagin kl. 15.00 Jólafest fyri børnum. Øll eru vælkomin.

### Ebenezer

Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, kl. 21.00 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Meinigheitshúsið

Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta kvinnur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Petur Steingrund, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20.00 Kvinnumøti, kl. 20.00 venur Manskórið.

### Hvítusunnusamkoman

*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

### Filadelfia

*Landavegur 22*
Í dag kl. 17.00 Landsbøn, kl. 20.00 Jólahugni fyri ung.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Steve Dulwich, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Kvøldmøti v/ Rúna Rasmussen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum

Leygardagin kl. 19.30: Møti við Egon Kattner. Evnið: Eitt fólk í arbeiði – Nehemia 3-6. Manskórið í Meinigheitshúsinum syngur. Innsavnan.
Sunnudagin kl. 19.00: Møti við Egon Kattner. Evnið: Eitt fólk í andaligari menning – Nehemia 8-9. Argjakórið syngur. Innsavnan. Drekkamuður verður hvørt kvøld. Øll eru vælkomin.

### Saron, Vestmanna

Hósdagin kl. 19.00 Frítíðararbeiði.

Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Jógvan Johannesen.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.

### Kedron, Sørvágur

Møtirøð við Pól Færø og John í Skemmuni verður í bygdarhúsinum í Miðvági fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnudagin kl. 16.00.

### Filadelfia, Sundalagi

Í morgin kl. 18.30-21.15 Alpha-skeið í Unitum í Kollafirði.

### Missiónsvika í Hósvík

Leygarkvøldið kl. 20.00 talar Regin Høgnesen, Magda og Maybrit syngja.
Sunnukvøldið kl. 19.00 talar Niels Juul Olsen, bólkurin Gittit syngur. Bønarløta verður 1/2 tíma áðrenn møti byrjar. Sunnukvøldið verður innsavnan fyri Heimamissiónina. Aftaná møti verður ein drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Meinigheitshúsið á Skála

Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19.00 verður seinasta møti í tí gamla húsinum, vitnimøti, innsamling.
Sunnudagin 9. desember kl. 17.00 verður nýggja Meinigheitshúsið vígt og tikið í nýtslu.

### Keldan, Skálafirði

Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi, Anfinn Jacobsen luttekur.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við ungdómi úr Kelduni, Barnamøti kl. 17.00.
www.keldan.fo

### Aglow, Kvívík

Jólafundurin verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 1. des. kl. 20.00. Sólrun og Tummas Jacobsen luttaka. Allar kvinnur og menn eru vælkomin.

### Lívsins Orð

Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Símun P. Jacobsen. Liljurnar møta mánadagin kl. 17.00 og ungdómsbólkurin kl. 20.30.

### Elim, Søldafjørður

Levi Joensen og aðrir luttaka á fundinum sunnukvøldið 2. des. kl. 18.00 Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Soli Deo Gloria

Leygarkvøldið kl. 19.00 Alpha skeið, kl. 20.30 Opið hús v/ A. Áargarð.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jan Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin vegna barnagudstænastu. Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 við Terja og Birgith. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til hús. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betania, Porkeri

Kvinnumøti verður mánadagin kl. 20.00.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Hús mítt eigur at vera eitt bønhús; men tit hava gjørt tað til eitt ránsmannabøli!«*

*Luk. 19,46*

Hitt útvalda fólkið kendi ikki vitjunartíð sína. Tað vístu tey við at vraka Jesus sum frelsara. Tey keyptu og seldu í templinum. Jesus sigur, at tey hava gjørt templið til eitt ránsmannabøli. Og soleiðis er tað, tá ein ikki kennur vitjunartíð sína. Guds hús eigur at vera eitt bønhús. Tað er bygt upp til Guds æru og har skal haldast gudstænasta, Jesus talar dóm í dag. Ikki bara tað at tey hava vanhalgað Guds hús, vit menniskju hava eisini gjørt heimin til eitt ránsmannabøli. Í heiminum er óndskapur og órættvísi. Heimurin er so vandamikil at búgva í, at lívsgrundarlag okkara verður hótt. Stríð, harðskapur og bardagi hótta heimin. Tað er vandamikið at vera til. Lív okkara verður hótt. Í heiminum hevur illimaður eitt stórt orð at siga. Vit hava gjørt heimin til eitt ránsmannabøli. Og hesin veruleiki hóttir eisini okkum sum kirkja. Vit vilja gera gudstænastuna til undirhald uttan álvarsemi. Tað ónda hóttir eisini okkum kristnu. Hetta, at summi halda, at loyvi skal gevast at víga samkynd, ber boð um, at Guds kirkja er hótt. Hennara grundarlag er hótt. Tað eru menniskju, sum vilja gera kirkju okkara til eitt ránsmannabøli, eins og heimurin er vorðin eitt ránsmannabøli. Minst til, kirkjunnar fíggindar finnast ikki uttanfyri kirkjuna; men teir finnast á ovastu rók í kirkjuni. Enn er tíð at venda um og taka eitt nýtt sinnalag fyri. Kenna vit vitjunartíð okkara? Amen.

**David Johannesen**